# Vegleiðing
# til umsóknarblaðið

Feløg og einstaklingar, sum søkja stuðul frá MáF, antin tað so er til týðing, leik, skeið ella annað, verða at brúka umsóknarbløðini, sum liggja á heimasíðu MáF's.

**Søkt kann verða um stuðul hesar tíðir:**

1. 1. mars.
2. 1. juni.
3. 1. september.

Stuðul verður ikki latin til tiltøk, sum longu eru farin í gongd ella sum longu hava verið.

Tá ið MáF játtar stuðul til leikuppseting, verður allur stuðulin útgoldin, tá ið fyrsta leiksýning hevur verið. **Ein fullfíggjað uppstilling av inntøkum og útreiðslum, undirskrivað av formanni og kassameistara ella øðrum ábyrgdara skal verða MáF í hendi í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at framførslurnar eru lidnar.**

**Felag, sum fær stuðul til leikuppseting, skal seta eitt fólk, sum hevur ábyrgd yvir fyri megin-felagnum.**

Stuðul til skeið og annað verður allur latin, so skjótt hann er játtaður. **Frágreiðing um skeiðið/ tiltakið skal latast MáF í seinasta lagi 1 mánaða eftir skeiðs-/ tiltakslok.**

Tá ið MáF veitir stuðul til leikrit, eigur MáF bert rættindini til tann umsetta leikin, um ein skrivlig avtala er gjørd við týðara ella limafelag um hetta. Rættindi mugu tó altíð søkjast av nýggjum frá uppruna rættindahavara, hvørjar ferð leikurin verður settur upp av nýggjum á palli.

Tað er umráðandi og lógarkravt í øllum førum, at **øll neyðug loyvi eru fingin** frá avvarðandi rætt-indahavara, **áðrenn farið verður undir at týða og/ella framføra ein og hvønn leik!** Støddin á avtalaða framførslugjaldinum verður sett í umsóknarblaðið. Til ber eisini at søkja um stuðul til hesa útreiðslu.

MÁF-skrivstovan hjálpir fegin við upplýsingum og vegleiðingum, tá ið ræður um at søkja um stuðul her og aðrastaðni.

Eru ivamál ella spurningar í sambandi við stuðulsumsóknina, eru tit altíð væl komin at seta tykkum í samband við skrivstovuna.

**Tórshavn, 11. mai 2015.**

**Ingun Christensen**
***fyrisitingarleiðari***